# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

# »Nice« Mazda6 í Nice




*Mazda6 í ymiskum útgávum bíða eftir at verða royndarkoyrdir í Nice*

**Við góðu royndunum av Mazda6 hava vit eitt gott grundarlag at byggja á, og vænta at nýggi Mazda6 eisini verður ein enn størri succes, søgdu umboð fyri Mazda Motor Europe á tíðindafundi í feriubýnum Saint Tropez í Fraklandi**



**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

**Nice:** Síðst í november í fjør royndarkoyrdu vit nýggja Mazda6 við fronsku miðjaraðarhavsstrondina. Saman við umboðum frá Mazda Motor Danmark og 15 skandinaviskum motorjournalistum høvdu vit høvi at royndarkoyra nýggja Mazda6 í tveir dagar.

Flogið varð úr Kastrup beinleiðis til Nice í Suðurfraklandi, har ein hópur av nýggjum Mazda6 í ymiskum útgávum bíðaðu eftir at verða royndarkoyrdir. Bilarnir høvdu innbygda navigatiónsskipan, og Mazda fólkini høvdu lagt rutur til rættis, har vit kundu royndarkoyra bilarnar í býkoyring, á høvuðsvegi og á motorvegi.

Leiðin gekk gjøgnum filmsbýin Cannes, sum er serliga kendur fyri sínar altjóða filmsfestivalar »Festival de Cannes«, og síðan til feriubýin Saint Tropez, har ferðalagið skuldi gista á luksushotellinum »Château de la Messardiere«.

Um kvøldið var tíðindafundur á hotellinum, har umboð frá Mazda í Evropa og Mazda í Japan greiddu frá um nýggja Mazda6. Á fundinum var sjálvur designstjórin hjá Mazda í Hiroshima japanarin Youichi Sato, sum hevur staðið fyri flotta designinum á Mazda6. Umboð fyri Mazda Motor Europe søgdu at teir við góðu royndunum av Mazda6 hava eitt gott grundarlag at byggja á, og vænta at tann nýggi verður ein enn størri succes.



*Designstjórin hjá Mazda í Hiroshima, japanarin Youichi Sato, sum hevur staðið fyri flotta designinum á Mazda6*



*Bilarnir hava innbygda navigatións-skipan*



*Mazda6 framsýning framman fyri hotellið*




*Leiðin gekk gjøgnum filmsbýin Cannes, sum er serliga kendur fyri sínar altjóða filmsfestivalar »Festival de Cannes«*



*Milliónbýurin Nice m.a kendur fyri »Promenade des Anglais«*